


*Brandur Sandoy væntar, at meiriluti er í Sands bygdarráð fyri at leggja alla Sandoynna saman í eina kommunu*

# ER FYRI SAMAN-LEGGING VIÐ LÓG

**SANDUR – Eg havi broytt støðu um samanlegging og eri nú fyri, at øll Sandoyggin verður løgd saman í eina kommunu – við lóg, um tað skal verða, sigur Brandur Sandoy, borgarstjóri í Sands kommunu**

Vilmund Jacobsen

Fyri umleið einum ári síðan var ein fyrireikandi fundur millum kommununnar í Sandoynni um møguliga samanlegging.

**»... eg havi broytt hugburð um samanlegging – frá tí, at eg læt meg stilla upp til bygdarráðsval...**

BRANDUR SANDOY

Borgarstjórin í Sands kommunu, Brandur Sandoy, ásannar, at tíðir broytast og umstøður við.

- Soleiðis er eisini við tí, tú heldur um ymisk viðurskifti og ymiskar umstøður. Eg noyðist bara at ásanna, at eg havi broytt hugburð um samanlegging – frá tí, at eg læt meg stilla upp til bygdarráðsval og til nú, eg havi sitið í bygdarráðnum síðan kommunuvalið seinast.

Tað sigur borgarstjórin í Sands kommunu.

### Gjarna við lóg

Brandur Sandoy er rættiliga sannførdur og avgjørdur um, at kommunurnar í oynni skuldu verið lagdar saman – við lóg, um neyðugt og ongantíð ov skjótt.

- Vit eru umleið 1400 íbúgvar í Sandoynni, og eg haldi, at sjálvt hendan eindin er ov lítil í einari kommunu. Tí haldi eg, at ein felags kommuna í oynni eigur at javnstillast við eina kommunu, sum telir umleið 2000 íbúgvar og fáa eina útjavning, sum hevur verið frammi, eftir hesum.

Borgarstjórin er sannførdur um, at ein so lítil kommuna, sum Sandoyggin verður, eigur at fáa eina serskipan millum aðrar størri kommunur, tá samanleggingarnar eru framdar.

### Ov lítið umrøtt

Sjálvur dugir Brandur Sandoy ikki rættiliga at siga, hvat aðrar kommunur í oynni siga um samanlegging, men hann væntar, at meiriuti er í Sands bygdarráð fyri at leggja alla Sandoynna saman í eina kommunu.

- Eg havi tó skilt, at eitt nú Húsavíkar kommuna er positiv um samanlegging, leggur borgarstjórin aftrat.

Brandur Sandoy heldur, at enn er ov tíðliga at meta um, hvar kommunurnar í oynni standa í spurninginum um eina møguliga samanlegging, tá bara hin eini fyrireikandi fundurin hevur verið.

*vilmund@sosialurin.fo*